# Pál setti nýtt føroyskt met

**Pál Joensen setti nýtt føroyskt met í 100 metra bringu um vikuskifti. Hann átti eisini gamla metið**




Uni Holm Johannesen

Pál Joensen setti nýtt met við tíðindi 1:03.99.

Hann átti sjálvur gamla metið frá Oyggjaleikunum á Álandi í fjør. Tá svam hann teinin við tíðini 1:05.50.

Tí betraði hann um tíðina við hálvum øðrum sekundi.

Jón Hestoy er formaður í Svimjisambandinum. Hann sigur í stuttari viðmerking við svimjing.com, at Pál svam væl, og at vágbingurin hevur sett eitt flott met.

Pál Joensen skal taka lut í HM-finaluni í 1500 metrar frí um tríggjar vikur.

Við metinum hevur hann prógvað, at hann er væl fyri í løtuni.

Pál Joensen vann fleiri gullmerki leygardagin. Hann var eisini fremstur í 400 metra frísvimjing, 50 metra firvald og 200 metra medley.

# Tanja vinnur seg fram

**13 ára gamla Tanja Skaalum, Suðuroyar Svimjifelag, framdi eitt bragd, tá hon setti nýtt føroyskt juniormet í 200 metra frísvimjing**



Uni Holm Johannesen

Tanja Skaalum setti met við tíðini 2:09.04. Cecilia Eysturdal, Ægir, átti metið frammanundan. Á Meistarastevnuni fyri ung í vár svam hon teinin við tíðini 2:09.46.

Jón Bjarnason, venjari, sigur, at Tanja Skaalum er serliga góð í bringusvimjing, og tí var tað stuttligt, at hon setti nýtt met í 200 metra frísvimjing.

- Eg visti ikki, at hon hevði sett met, tá hon kom úr hylinum. Tað verður áhugavert at fylgja henni í framtíðini, sigur hann við svimjing.com.

13 ára gamla Tanja Skaalum hevur junioraldur næsta ár, og tí er úrslitið sera flott.

Svimjisambandið setti sum kravtíðina til NJM í desember at vera 2:14.84 til yngra junioránangin. 2:11.30 er kravtíðin til eldru juniorarnar.

Tanja Skaalum er tvey sekund skjótari enn harðastu kravtíðina, men hon er ov ung til at taka lut á NJM.

# Jákupsson er skjótastur á 200 metra blandað

**Magnus Jákupsson, Havnar Svimjifelag, setti nýtt føroyskt juniormet í 200 metra blandaðari svimjing í vikuskiftinum**

Uni Holm Johannesen

Magnus Jákupsson kom á málið við tíðindini 2:10.51. Hann átti eisini gamla metið. Tað var frá Meistarastevnuni fyri ung í vár. Tá var tíðin 2:12.12.

Havnardrongurin betraði tí um metið við gott og væl tveimum sekundum.

Magnus Jákupsson úr Havnar Svimjifelag setti í kvøld juniormet í 200 metra blandaðari svimjing, við tíðini 2:10.51 har juniormetið hjá Magnusi sjálvum frá Meistarastevnuni fyri Ung í vár var 2:12.12. Ein flott betring hjá unga havnarmanninum, hóast hann hevur stríðst við sjúku í seinastuni.

# Úrslitini í Bank Nordik stevnuni

### 100 M BRINGUSVIMJING, KVINNUR

| | |
|---|---|
| 1. Tanja Skaalum, Suðuroyar Svimjifelag | 1:15.61 |
| 2. Sunnleyg Eliasen, Fuglafjarða Svimjifelag | 1:21.34 |
| 3. Poula Ø. Mohr, Fuglafjarða Svimjifelag | 1:21.70 |

### 100 M BRINGUSVIMJING, MENN

| | |
|---|---|
| 1. Pál Joensen, Suðuroyar Svimjifelag | 1:03.99 |
| 2. Jón Hofgaard, Suðuroyar Svimjifelag | 1:08.50 |
| 3. Pauli Ø. Mohr, Havnar Svimjifelag | 1:08.99 |

### 400 M FRÍSVIMJING, KVINNUR

| | |
|---|---|
| 1. Tanja Skaalum, Suðuroyar Svimjifelag | 4:32.24 |
| 2. Victoria Wigant Eysturdal, Ægir Klaksvík | 4:55.92 |
| 3. Kristina Eliasen, Havnar Svimjifelag | 5:01.55 |

### 400 M FRÍSVIMJING, MENN

| | |
|---|---|
| 1. Pál Joensen, Suðuroyar Svimjifelag | 4:18.25 |
| 2. Sigmund Mørkøre, Ægir Klaksvík | 4:18.60 |
| 3. Sofus Bech, Suðuroyar Svimjifelag | 4:20.83 |

### 200 M RYGGSVIMJING, KVINNUR

| | |
|---|---|
| 1. Edit Dahl, Havnar Svimjifelag | 2:30.21 |
| 2. Jóhanna Egholm, Fuglafjarðar Svimjifelag | 2:31.22 |
| 3. Erna Katrin Olsen, Suðuroyar Svimjifelag | 2:46.99 |

### 200 M RYGGSVIMJING, MENN

| | |
|---|---|
| 1. Magnus Jákupsson, Havnar Svimjifelag | 2:08.41 |
| 2. Eyðbjørn Joensen, Suðuroyar Svimjifelag | 2:24.67 |
| 3. Óli Mortensen, Havnar Svimjifelag | 2:26.84 |

### 50 M FIRVALD, KVINNUR

| | |
|---|---|
| 1. Astrið Foldarskarð, Svimjifelagið Flot | 30.03 |
| 2. Shaila Millum Garðarnar, Suðuroyar Svimjifelag | 30.25 |
| 3. Poula Ø. Mohr, Fuglafjarðar Svimjifelag | 30.48 |

### 50 M FIRVALD, MENN

| | |
|---|---|
| 1. Pál Joensen, Suðuroyar Svimjifelag | 25.88 |
| 2. Pauli Ø. Mohr, Havnar Svimjifelag | 27.42 |
| 3. Bartal Hestoy, Havnar Svimjifelag | 28.80 |

### 200 M MEDLEY, KVINNUR

| | |
|---|---|
| 1. Helena Strøm Sævarsdóttir, Suðuroyar Svimjifelag | 2:42.99 |
| 2. Anna Larsen, Fuglafjarðar Svimjifelag | 2:46.49 |
| 3. Edit Dahl, Havnar Svimjifelag | 2:47.94 |

### 200 M MEDLEY, MENN

| | |
|---|---|
| 1. Pál Joensen, Suðuroyar Svimjifelag | 2:07.72 |
| 2. Magnus Jákupsson, Havnar Svimjifelag | 2:10.51 |
| 3. Tróndur Olsen, Svimjifelagið Flot | 2:29.34 |